# – Best at gerast gamal so líð



*– Mær dámar sera væl at lesa. Alt hetta við at ganga túrar, tað hevur aldrin verið nakað serligt fyri meg. Eg brúki nógvar tímar til lesing, sigur Símun Waag Høgnesen, sum her situr við bókini hjá soni sínum Birgir Waag Høgnesen "Teir tóku kjansin"*

*Mynd: Snorri Brend*

**Hóast klaksvíkingurin Símun Waag Høgnesen táttar í tey 80, so er trupult at fáa eyga á árini.**
**– Tað er faktist stutt síðani at eg viðgekk fyri mær sjálvum, at eg ikki havi somu kreftir í dag sum áður, sigur hann.**
**Hann býr í egnum húsum, men hann og konan hava søkt um at sleppa inn á felags íbúð hjá kommununi.**

ELDRI FØROYINGUR
*Snorri Brend*

**Vágsgeil, Klaksvík:** – Mær dámar sera væl at lesa. Eg lesi næstan alt, sum eg kann fáa fatur á – bløðini, bøkur og annað.

– Tað hugni eg mær so við! Ja, eg kann gott brúka fleiri tímar til lesing.

At Símun talar satt, er køksborðið fullgott boð um. Í eini lítlari rúgvu á borðinum liggja nakrar útgávur av teim nýggjastu føroysku dagbløðunum, við lokalblaðnum Norðlýsinum ovast. Ein er væl ikki klaksvíkingur fyri einki!

Tað er týðiligt, at Símun ynskir at fylgja við í tí, sum rørir seg í føroyska samfelagum. Og so er líkamikið um aldur hansara er vorðin rættiliga høgur.

– Spyr meg ikki um aldur. Eg kann bara siga, at eg eri væl ávegis til 80. Men so vil eg eisini skunda mær at leggja aftrat, at aldurin er ikki nakað sum eg soleiðis gangi og hugsi um til dagligt.

– Eg havi faktist ikki fyrrenn nú í seinastuni heft meg við at eg var vorðin gamal. Tað vóru knøini, ið søgdu mær frá hesum!, sigur hann og smílist.

Lagnum á Símuni bilar einki. Hann er andsfrískur, virksamur og fær gerandisdagin at hanga saman, hóast konan í løtuni er til umlætting á røktarheiminum í Klaksvík.

## 40 ár til koyrikort

Vit hava avtalað eina tíð til hesa samrøðuna – umleið kl. 13:15.

Í telefonini hevur hann sagt mær vegin niðan í Vágsgeil nr. 10. Og tað gongur væl, hóast eg ikki havi verið á hesum kantum áður.

Tað kann kanska undra, at ein bilur stendur í túninum hjá einum manni, sum er komin so høgt til alders. Men fyri Símun hava júst bilarnir – ella rættari: bilførararnir – verið hansara livibreyð størsta partin av lívinum.

Saman við soninum Manna hevur hann sjálvur í nógv ár – omanfyri 40 ár – givið frálæru í teori og koyring til klaksvíkingar og norðoyingar, bæði tá talan var um persónbil, lastbil og motorsúkklu.

– Hvussu nógv fólk hava tikið koyrikort hjá mær hesi árini? Noy, tað havi eg ikki ánilsi av. Eg havi ongatíð talt.

– Men okkurt árið minnist eg at eini 150 tóku koyrikort hjá mær, og okkurt annað árið eini 100. Men talið? Tað veit eg ikki.

Símun og elsti sonurin Manne skipaðu tað so, at hesin seinni tók sær serliga av teimum, sum skuldu taka tað stóra koyrikortið, meðan Símun tók sær í serligan mun av hinum.

Sjálvur dámar Símuni væl at koyra bil, og er tí rættiliga ofta biltúrar saman við